# Wenger vil av við Føroyar og hini smáu londini

– Altjóða landsliðsfótbóltur er blivin eitt langt geisp, sigur Arsenal-venjarin Arsene Wenger, sum heldur, at flestu av dystunum í landsliðshøpi eru óáhugaverdir, tí munurin millum liðini er so stórur

– 80 prosent av landsdystunum um vikuskiftið vóru púra óáhugaverdir, og heldur hetta fram, fara fólk at missa áhugan fyri landsliðsfótbólti, sigur Arsene Wenger við enska blaðið The Sun.

Millum dystirnar, sum fyrrverandi venjarin hjá Inga Højsted uttan iva sipar til, er skotski stórsigurin á Føroyum og enski stórsigurin á Andorra.



# Rokna við at Schumacher gevst

Stórur spenningur er til Formil 1 kappkoyringina á Monza-breytini sunnudagin. Tað er ikki bara orsaka av sjálvari kappingini, at spenningur er, men eisini tí, at fleirfaldi týski heimsmeistarin Michael Schumacher fer at hava eina fráboðan um sína framtíð. Týska blaðið Bild Zeitung gitar í dag, at Schumacher fer at boða frá, at hann gevst at koyra Formil 1 eftir ársins kapping. Ferrari hevur roynt at fingið Schumacher at leingja sín sáttmála, men higartil hevur hann ikki vilja tosa um sína framtíð í Formil 1. Tað ger hann sunnudagin.



*Ralf Ragnick royndi at fáa dómaran at skora fyri sítt lið*

# Venjari bað dómaran skora

**Kendur týskur fótbóltsvenjari blandaði dómaran við ein av sínum egnu spælarum og bað hann gera mál**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tey eru mong, sum í hesum døgum smílast eftir venjaranum Ralf Rangnick, sum áður hevur vant týsku feløgini Schalke 04 og Stuttgart. Nú er Rangnick venjari hjá felagnum TSG Hoffenheim, og undir einum dysti herfyri rópti hann á dómaran og bað hann taka seg saman og skora.

Rangnick er litblindur, og hann gjørdist ikki sørt nipin, tá ið hann fekk at vita, at hann hevði blandað dómaran við ein av sínum spælarum.

Rangnick er litblindur, og hann hevur serliga ilt við at skilja ímillum grønt og reytt.

– Vanliga spæla vit í bláum, men vit spældu hesaferð í okkara reyðu útivallartroyggjum, og tá ið dómarin var í grønum, sá eg ikki munin millum hann og mínar spælarar, sigur Rangnick við týskar fjølmiðlar.

# Føroyar vann súkkludystin móti Íslandi

**Um vikuskiftið vóru sjey føroyskir súkklarar í Íslandi. Tríggjar súkklukappingar vóru á skránni, býarkoyring, landavegkoyring og einkultstartur. Føroysku súkklararnir vunnu gull í øllum trimum kappingunum**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Tað vóru ikki færri enn tríggir føroyingar, ið fingu heiðurin at standa ovast á sigurspallinum teir tríggjar dagarnar, kappingarnar varðu.

Føroyingarnir fóru til Íslands fríggjadagin og longu fríggjakvøldið stóð fyrsta kappingin á skránni. Koyrast skuldi 40 km býarkoyring. Veðrið var av tí allarbesta, og tað var lagið í føroysku leguni eisini eftir kappingina, tí føroyingar áttu øll trý medaljuplássini. Bogi Kristiansen vann, Gunnar Dahl-Olsen gjørdist nummar tvey, og Eli Christiansen trý.

Veðrið var aftur gott leygardagin, og í brennandi sólskini løgdu súkklararnir til brots leygarmorgunin. Kappast skuldi í 70 km Landavegkoyring. Leiðin gekk fram við Tingvallavatn, og á leiðini har eru væl av brekkum, og tí var teinurin bæði spennandi og strævin.

## Eli í essinum

Hóast skaða í knænum var Eli væl koyrandi og stutt eftir at kappingin var skotin ígongd, lá Eli í útbroti saman við unga og sterka Hlynur Thorsteinsson. Hetta útbrotið helt leingi, og ikki fyrr enn farið var undir teir seinastu 20 km, vóru Eli og Hlynur heintaðir av hinum.

Bogi hevði gulu førara-troyggjuna at verja, og uppá skift royndu Bogi og Gunnar at sleppa avstað frá feltinum, nú kappingin nærkaðist endanum. Báðir fóru sjálvandi eftir sigrinum. Men Gunnlaugur Jónasson, ið sá sær ein møguleika at vinna samanlagt, um hann ikki misti ov nógva tíð í hesari kappingini, súkklaði skjótt og effektivt útbrótararnar inn aftur.

Tað vóru umleið sjey súkklarar, ið súkklaðu saman, nú bert fáir kilometrar vóru eftir á mál. Millum hesar vóru Bogi, Eli, Torkil og Gunnar. Men tað var Gunnar, ið lá best fyri í endaspurtinum og hevði best bein, og tí var tað hann, ið vann endaspurtin móti Boga, Gunnlaugur Jónasson úr Íslandi, Brad Evans úr USA.

## Einkultstarturin avgerandi

Í samlaðu støðuni var tætt millum fremstu súkklararnar, og tí var spenningur í luftini undan einkultstartkappingini, ið fór fram við Bláalón.

Koyrast skuldi 20 km, og tá menn høvdu koyrt hálvan teinin lá Gunnlaugur Jónasson á odda, og hann førdi við umleið 15 sekundum framman fyri Gunnar. Hetta visti Gunnar, ið royndi tí av øllum alvi at koyra Gunnlaugur inn aftur. Men ov nógvar kreftir vóru allarhelst brúktar leygardagin, og tí eydnaðist hetta ikki, og íslendingar fingu tí sín fyrsta sigur.

Men heldur ikki sunnudagin fóru føroyingar tómhentir avstað eftir kappingarlok. Torkil Veyhe, ið fekk sera harða kapping frá Hlynur Thorsteinsson allar dagarnar, megnaði sunnudagin at vinna einkultstartin hjá unglingum við bert einum sekundi. So gott koyrdi Torkil, at hann umframt at vinna unglingabólkin, gjørdist nummar trý hjá teimum vaksnu, bert hálvan annan minutt eftir vinnaran, Gunnlaugur Jónasson.

Gott veður, spennanandi kappingar, jalig upplivilsir, góð venjing og gott vinarlag var tað, ið føroysku súkklararnir upplivdu í Íslandi farna vikuskifti.

Komandi vikuskifti skulu føroysku súkklararnir aftur í eldin. Á skránni standa tvær FM-kappingar. Fríggjakvøldið verður kappast í 40 km einkultstarti og sunnudagin í 100 km landavegkoyring.

Til ber at tilmelda seg og lesa um kappingarnar á www.tsf.fo.



*Gunnar Dahl Olsen vann kappingina í landavegssúkkling, meðan Bogi Kristiansen vann býarsúkklingina. Torkil Veyhe vann einkultstartin hjá unglingum*